# Miðlamjørr

LAGT TIL RÆTTIS: Eydna Skaale

Hvat er betri enn at sita i køkinum hjá tínari bestu vinkonu og drekka kaffi? :-D

**Kvinna 30 ár**



"- Eg havi viðgjørt slíkar søgur óteljandi ferðir í mínum sjónvarpsshowið, og eg havi óteljandi ferðir sæð, hvussu yvirraskað fólk verða. Eg hevði aldrin, aldrin, aldrin trúð, at tað fór at henda fyri meg eisini.

Oprah Winfrey um júst at hava fingið samband við higartil ókendu hálvsystur sína, Patricia, sum mamman burtadopteraði beint eftir burðin.



- Ætlanin um at fáa limaskap í EFTA er ikki slept, men í løtuni slepst ikki longur.

Jacob Vestergaard.

Ótrúligt hvat summi tingfólk ferð eftir ferð skulu skriva upp og niður í pressuni aftaná at okkurt mál er dukkað upp! Hví eru hesi tingfólk ikki fyri eina ferð skyld uppá forkant?

**Maður 33 ár**



- Eg eri ein ósekur maður!

Conrad Murray, Læknin hjá Michael Jackson, nú hann enn einaferð hevur verið í rættinum fyri óviljað manndráp á popstjørnuna.

Einaferð var tað ein edrúur nólsoyingur, ein beinur hasjari, ein ópatriotiskur klaksvíkingur, ein tigandi danskari, ein stuttligur týskari, ein suðuroyingar, sum ikki bannaði, ein stillur amerikanari, ein gift nonna og ein glaður Liverpool-fjeppari !!

**Maður 43 ár**



– Tað er einki, sum diskvalifiserar Føroyar at hýsa oyggjaleikunum! Her í Føroyum er ein ógvuliga stór entusiasma, og eitt ógvuliga stórt hjartalag, tá um ítrótt ræður."

Jørgen Petterson, forseti í IGA



- Eg vil binda meg til at tryggja fíggjarvøksturin, at skapa nýggj størv og at styrkja fíggjarstøðuna hjá miðalklassanum. Tað er mítt nýggjárslyfti!

Barack Obama

§266B hjálpti, nú er gliðibreytin komin á Skálatrøð.

**Maður 46 ár**



"- Eg hati at gera mat. Eg vil heldur svølta í hel enn at matgera sjálv. Eg kann gott yvirliva í eina viku uttan at eta.

Megan Fox

Kanska skulu býir og lond (Klaksvík og Føroyar) gloyma afturflytarar og heldur ynskja sær tilflytarar ...

**kvinna ókendur aldur**